# Santos noyðist at hugsa um pengarnar

**– Eg spæli fótbólt fyri familjuna í Brasilia, og tá føroyska lóggávan forðar mær at hava fulltíðarstarv eisini, noyðist eg at hugsa so, sigur Alex José dos Santos, sum er sera fegin um møguleikan at spæla við EB/Streymi. Í oktober ætlar hann at rópa seg fyri føroyskan greipuvinnara fyri fyrstu ferð**



– Eftir fimm ár í B36 skal besti sambabakkurin í Føroyum nú spæla við EB/Streymi. Men hann letur tað vera upp til venjaranar, hvar á vøllinum teir vilja gera nýtslu av sær
Mynd: Álvur Haraldsen

– Pengarnir vigaðu nakað, tá eg gjørdi av at skifta til EB/Streym. Eg tosaði við B36 í vetur, og teir gjørdu beinanvegin greitt, at eg noyddist niður í løn. Og tað kundi eg ikki góðtaka. Eg spæli fótbólt fyri familjuna í Brasilia, og tá føroyska lóggávan forðar mær at hava fulltíðarstarv eisini, noyðist eg hugsa so. Tað er sjálvsagt harmiligt.

Soleiðis sigur 28 ára gamli Alex José dos Santos. Brasiliumaðurin skifti í vetur til greipuvinnarnar úr EB/Streymi eftir fimm ár í hvíta búnanum hjá B36. Nú skulu hann og Sigfríður Clementsen, sum áttu týðandi leiklut í FM-heitinum hjá B36 í 2005, royna at endurvinna gullheiðursmerkini, sum felagið tryggjaði sær í fjør.

## Metingin

**Tað verður ofta sagt, at tað er truplari at endurvinna eitt meistaraheitið enn at vinna tað. Men við hópinum, sum EB/Streymur hevur, er eingin ivi um, at málið aftur í ár er gull á øllum økjum. At tað eru fleiri enn 11, sum hava dygdir til at byrja inni hvørja-ferð, gevur eisini venjarunum fleiri møguleikar at blanda kortini, men tað økir eisini um vandan fyri ónøgd í spælarahópinum.**

### Glaður fyri venjaran

Brasiliumaðurin fekk av álvara sítt gjøgnumbrot í føroyskum fótbólti í 2005, tá hann og liðfelagarnir úr B36 vunnu føroyameistaraheitið undir leiðslu av tá 32 ára gamla Sigfríði Clementsen. Høvuðsvenjarin flutti Santos aftur á vongverjan, og skjótt vann brasiliumaðurin sær heitið sum besti maður á sínum plássi í føroysku landskappingini. Nú eru teir báðir í Sundalagnum, og uppgávan hjá teimum báðum er at endurvinna greipuna við EB/Streymi.

– Mær dámar sera væl Sigfríð Clementsen. Hann er ein fittur og positivur maður. Eg spældi undir honum í tvey ár í B36, og tað er sjálvandi ein fyrimunur. Hann veit, hvat eg dugi, og hvat eg ikki dugi. Hann er heilt avgjørt ein av orsøkunum til, at eg skifti til EB/Streym. Sigfríður Clementsen og Magni Mohr eru sera dugnaligir, og eg eri sannførdur um, at teir kunnu menna meg meira sum fótbóltspælara. Eg gleði meg til komandi kappingarár, sigur Alex José Dos Santos, sum er fegin um møguleikan, hann hevur fingið við Margáir, har hann er sera væl móttikin.

Fleiri hava sett spurnartekin við, hvar á vøllinum tú skal spæla í komandi kappingarári. Leif Niclasen stóð seg sera væl sum vongverji í vinstru í fjør. Hvat væntar og vónar tú sjálvur?

– Tað dugi eg als ikki at siga. Tað avger Sigfríður Clementsen, staðfestir Santos.

### Framtíðin er óviss

Tað eru ikki einans føroyingar, sum hava varnast dugnaligu fótbóltsevnini hjá Santos. Hann hevur seinnu árini fingið tilboð úr útlandinum, og millum annað vísti hann FC Amager og Toda Jónsson aftur á sumri í 2007.

Hóast dreymurin einaferð var at royna seg í sterkari fótbóltskapping enn tí føroysku, dugir brasiliumaðurin í dag ikki at siga, hvørjar ambitiónir hann hevur við fótbóltinum.

– Nú havi eg júst skift til EB/Streym, og vónandi fari eg at standa meg væl. Meira dugi eg ikki at siga um framtíðina í løtuni, sigur Santos, og leggur afturat, at føroyskur fótbóltur hevur flutt seg rætta vegin.

– Tekniskt og ikki minst kropsliga eru føroysku leikararnir munandi betur fyri í dag. Tað eru fleiri av teimum ungu, sum bjóða seg fram. Teir ræðast ikki avbjóðingina og gera vart við seg, sigur Santos.

### B36 kann bjóða av

Við tilgongdini av Alex José dos Santos, Pæturi Dam Jacobsen, Paula G. Hansen og Gudmundi Nielsen verður av álvara væntað, at EB/Streym aftur í hesum kappingarárinum fer av bjóða av í FM-stríðnum. Men Santos staðfestir, at tað ikki verður lætt.

– Tað eru fleiri góð lið á pappírinum. Nú havi eg spælt við B36 seinastu fimm árini, og eg eri vísur í, at teir kunnu kappast um heiðursmerkini. Hóast fleiri av stuðulsleikarunum eru burtur, sær hópurin sterkur út. HB, ÍF og NSÍ verður heldur ikki lættir at syfta. Men vit ætla okkum sjálvandi gullið, sigur 28 ára gamli Alex José dos Santos.

**Uni Holm Johannesen**
**uni@sosialurin.fo**

Saman við okkum røkkur tú longri
Føroya Banki er errin av at samstarva við EB/Streym.
FØROYABANKI